# Spæl·við



## Orðapikk

**Orðapikk**
Í spælinum skalt tú læna orð úr orðabankanum, renna út og hitta ein makkara, sum eisini hevur lænt eitt orð. Tá ið tit hittast, skulu tit vísa hvørjum øðrum orðini.

Hava tit sama orðaflokk, klappa tit í hendurnar á hvørjum øðrum og renna víðari til hvør sín nýggja lánara.

Hava tit ymiskar orðaflokkar,
vinnur tann, sum hevur tann sterk-asta orðaflokkin. Síðan
fylgjast tit til orðabankan, lata orðini inn og læna tvey nýggj orð.

Áðrenn tit spæla orðapikk, skulu tit gera av, hvør orðaflokkur skal vera sterkastur, hvør skal vera næststerkastur, og hvør skal vera veikastur.

- Læn orð úr orðabankanum.
- Hitt ein makkara.
- Klappa ella læn nýggj orð úr orðabankanum.

